Eilen Anthoniussen
eilen@sosialurin.fo
GLAÐIR pensionistar

# Havnin er myndað av bygdamentan

**Bygdamaðurin, sum elskar Havnina, tað er Finnur Johansen. Hann sigur, at Havnin er tað, sum bygdafólk hava gjørt hana til. Undir serligum umstøðum fekk hann sum býráðslimur útstykkingina á Konmansmýru útbjóðaða til svongu borgararnar í 1970 árunum, og í dag er hann formaður í pensionistafelagnum í Havn. Tað er bara eitt, hann ikki orkar fyri. Tað er bingo spæli**



*Húsini hjá Finni Johansen við Hoydalsvegin í Havn, eru umringað av vøkrum grønum umhvørvi. Havnará rennir framvið húsunum, og í túninum trívast rabarburnar væl. Gamli brenniovnurin frá fiskaplássinum á Nabb tekur seg eisini væl út í garðinum.*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

GLAÐIR PENSIONISTAR

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Ein kann ikki rættiliga lata vera við at leggja til merkis húsini hjá Finni Johansen, tá ein kemur gangandi eftir Hoydalsvegnum. Tað eru tey næstovastu á Hoydalsvegnum, á somu síðu sum viðarlundin. Tey eru lág við flagtaki og einum serstøkum torni. Húsini eru ikki nýggj. Tey vóru bygd í 1963, og bygt varð upp í húsini umleið 10-15 ár seinni. Seinni nýtti norski arkitekturin, Ola Steen húsini hjá Finni sum fyrimynd til byggingina av Norðurlandahúsinum. Og fyri trimum árum síðan kom ein journalistur á gátt, sum var so hugtikin av húsunum, og vildi hava myndir og eina grein um húsini blaðið.

- Men eg havi ongantíð sæð nakað til greinina hjá hesum journalistinum, sigur Finnur Johansen.

Sjálvur er Finnur Johansen útbúgvin verkfrøðingur. Hann gavst at arbeiða fyri 10 árum síðan, og kundi tá fara frá við góðari samvitsku, vitandi um at hann hevði tænt fyri seg.

- Eg fór til Keypmannahavnar at lesa verkfrøði sum 20 ára gamal, og kom aftur 10 ár seinni. Tá var einki arbeiði til verkfrøðingar í Føroyum. Men eg eri sannførdur um, at tekniska menningin byrjaði tá verkfrøðingarnir komu heim aftur til Føroya.

## Klakti 1000 maskinmeistarar

Verkfrøðingar vóru í 1960 árunum nýggir í Føroyum, um tað mundi tá Finnur saman við familjuni flutti aftur til Føroya. Í Føroyum var einki arbeiði at fáa í Havn, og fór hann fyrst á Skála Skipasmiðju at arbeiða eitt skifti.

- Men so fekk eg arbeiði á Maskinmeistaraskúlanum. Eg var við til at stovna skúlan í sínari tíð.

Finnur Johansen gjørdist lektari á skúlanum, har hann helt fram tey næstu 25 árini. Nógv ár seinni, í 2005, gav hann út bók um Maskinskúlan.

- Eg plagi at siga, at eg havi verið við til at útbúgva 1000 maskinmeistarar, sigur hann flennandi.

Finnur Johansen var eisini við til at stovna verkfrøðingafelagið í Føroyum, hóast tað bert vóru 10 verkfrøðingar í landinum. 5-10 ár seinni hevði felagið fleiri enn 100 limir.

Tá Finnur Johansen gavst á Maskinmeistaraskúlanum, tók hann við starvinum sum samferðslustjóri, sum hann røkti væl, og í 1972 stillaði hann upp til býráðsval og kom inn.

## Borgarstjóri í ein dag

- Politikkur var ikki fremmandur heima hjá okkum. Foreldrini hjá mær fluttu til Vágs at arbeiða sum lærarar, har pápi mín sat sum býráðslimur í 20 ár, harav seks ár sum formaður. Beiggi mín sat sum býráðslimur í danskari kommunu í 25 ár, og systir mín, Marita Petersen, gjørdist jú løgmaður, greiðir Finnur Johansen frá.

Tað kom tískil ikki óvart á nakran, at Finnur eisini fór upp í politikk. Tað endaði við at hann var sitandi í býráðnum í trý valskeið, frá 1972-84. Fyrst sat hann sum formaður í fíggjarnevndini, síðan sum formaður í mentamálanevndini, og seinastu fýra árini sat hann sum 2. varaborgarstjóri.

- Hetta var ein spennandi tíð í Føroyum. Tá var verri statt enn í dag, tí eingin fekk grundstykki um hesa tíðina. Nógv kjak var um útstykking á Konmansmýru. Men tað var samstundis stór mótstøða um at stykkja økið út, tí ivamál var um frárenning og so víðari.

Kortini var arbeiðið við at stykkja Konmansmýru út komið so væl áleiðis, at tað bert var eftir at bjóða út. Tað hendi so tað, at bæði borgarstjórin og varaborgarstjórin vóru burturstaddir, og Finnur sá sín møguleika til at taka eina avgerð, sum formaður í fíggjarnevndini. Saman við býararkitektinum avgjørdi hann at bjóða Konmansmýru út, teir lýstu við útbjóðingini í bløðunum, og upplýstu um at útbjóðingartilfarið kundi heintast á kommunuskrivstovuni mánadagin eftir.

- Og tað gekk. Í dag er Konmansmýra eitt fantastiskt øki. Høvdu vit ikki gjørt tað á handa hátt, hevði Konmansmýra neyvan verið boðin út enn. Soleiðis upplivdi eg at vera borgarstjóri í ein dag, sigur hann og flennir.

## Eg orki ikki fyri bingo

Í heyst vera 10 ár síðan Finnur Johansen gavst at arbeiða, og fyllir hann um sama mundi 77 ár. Ein virkin maður sum hann, hevur ongar trupulleikar við at fáa tíðina at ganga. Sínar royndir sum formaður og stjóri koma væl við, nú hann er vorðin formaður í pensionistafelagnum í Havn.

- Við pensionistafelagnum hittast vit í Losjuni hvønn mikudag, og vit hava ríkiligt av tiltøkum at ganga upp í. Tann 11. juni fara vit saman við pensionistafelagnum í Runavík til Lemvig í Danmark ein túr. Vit vera eini 100 fólk. Tað er bara eitt, eg ikki orki fyri. Tað er bingo. Eg orki ikki fyri at spæla bingo, og tað gevur heldur ongar pengar. Men hava limirnir tað stuttligt, so er alt í lagi, sigur hann smílandi.

Harafturat skrivar hann framvegis, og hevur altíð gongd í onkrum. Ein nýggj bók um Havnina er ávegis, og er hon í sama stíli sum undanfarna bók, bara við nýggjari myndum.

- Tann nýggja bókin fer at hava myndir úr Havn frá 1900-1940, sum eg havi roynt at tíðarfest og greitt frá, hvat hendir á myndunum. Tann fyrra snúði seg um Havnina frá 1860-1900. Hon snýr seg sjálvsagt um Havnar søgu, men eg havi skrivað hana út frá tí, eg veit og havi hoyrt. Eg ætlaði at hon skuldi koma út á ólavsøku, men tað verður altso útsett.

Saman við tveimum av trimum synum, húsast hann framvegis við Hoydalsvegin. Sjálvur er Finnur Johansen bygdamaður. Pápin varð ættaður úr Vík, og mamman av Viðareiði, men tey fluttu til Vágs at vera lærarar. Kortini er Havnin heimið fyri Finn Johansen, og einasta stað, hann kundi hugsað sær at búð.

- Eg plagi at siga, at Havnin er myndað av bygdafólki, sum hava búsett seg her, sigur hann við einum skálkabrosi.